## Tróndur aftur til Neistan

Eftir at hava fjakkað í Eystanlondum er Tróndur Kragesteen nú aftur í Føroyum, har hann ætlandi skal styrkja um mansliðið hjá Neistanum. – Nú eri eg komin heim og eri byrjaður at venja aftur. Renni og venji styrkivenjingar. Eri eg nóg góður, og venjarin ætlar at brúka meg á besta liðnum, sigi eg ikki nei takk, sigur Tróndur Kragesteen við heimasíðuna hjá Neistanum. Hann hevur seinnu árini ment seg til at vera ein av avgjørdu lyklaspælarunum hjá Neistanum, og hann var eisini partur av landsliðshópinum, áðrenn hann í summar fór at fjakka.



# Neistin nær við – og tó

**Í fyrra dystinum ímóti serbiska oddaliðnum, RK Kolubara, megnaði Neistin at bíta frá sær, so serbarnir bara vunnu við einum máli. Men í seinna dystinum var krútið uppi hjá Neistanum, ið tapti stórt**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Annað árið á rað var mansliðið hjá Neistanum við í EHF Cup-kappingini, og enn eina ferð megnaði liðið at fáa eitt gott úrslit. Í fjør gjørdist tað til ein heimasigur ímóti RK Lovcen Cetinje, sum var vunnin við einum máli, og hesa ferð var Neistin bara eitt mál frá javnleiki í fyrra dystinum ímóti serbiska RK Kolubara.

Í dystinum leygarkvøldið, sum formliga var útidysturin hjá føroysku steypavinnarunum, byrjaði Neistin væl og var fleiri ferðir á odda, bæði 5-2, 9-7 og 11-8, áðrenn serbarnir javnaðu til 13-13, tá 10 minuttir vóru eftir av fyrra hálvleiki.

Eftir steðgin vóru tað serbarnir, ið hildu seg frammanfyri, onkra løtu við fýra málum, men ímóti endanum reistist Neistin aftur og síðsta korterið stóð fleiri ferðir á jøvnum. Men í evstu løtu fekk RK Kolubara avgerandi málið og vann.

Eingin ivi um, at Neistin við hesum enn eina ferð framdi eitt avrik, føroyskur hondbóltur kann vera errin av. Og hóast úrslitið sunnudagin slett ikki livdi upp til fyrra dystin, so er talan um ein megnar innsats!



Neistin legði aftur í ár ein góðan innsats eftir seg í EHF Cup, og hóast seinni dysturin ikki gjørdist líka glæsiligur sum tann fyrri, ið var taptur við bara einum máli, er avrikið hjá Neistanum klárt góðkent

Savnsmynd: Álvur Haraldsen

### Afturum beinanvegin

Sunnudagin tóktist onkursvegna, sum var krútið uppi hjá Neistanum, sum ongantíð slapp inn í dystin, men beinanvegin dragnaði og var langt frá at koma upp á javnt, tíansheldur at koma framum.

Spælararnir hjá RK Kolubara vóru sera kontantir í seinna dystinum, og bara í fyrra hálvleiki fingu teir seks útvísingar, meðan Neistin bara fekk eina. Og tá komið var til hálvleiks, var alt longu avgjørt, tí munurin var átta mál.

Í seinna hálvleiki fekk verjan betur tak á serbunum, og tað gekst heldur betur. Álopsspælið, ið riggaði væl undan steðginum, riggaði sera væl í seinna hálvleiki, tá Neistin fekk ikki færri enn 18 mál.

Framvegis var serbiska spælið kontant, men hóast RK Kolubara ofta var í minniluta, tí spælarar vóru útvístir, megnaði Neistin ikki í nóg stóran mun at gera sær dælt av tí, og sostatt gjørdist talan um ein greiðan serbiskan sigur í seinna dystinum.

### FAKTA um dystirnar

**RK Kolubara-Neistin 37-36 (19-17)**
*Leygarkvøldið 14. november kl. 18*
**10 min:** 5-8
**20 min:** 13-13
**40 min:** 23-20
**50 min:** 30-30
**Málskjúttar**
**Neistin:** David Edvardsen 8, Heini Hanusarson 8, Finnur Hansson 6, Sjúrður Thomassen 6, Áki Mørk 5, Jugoslav Djumic 3

**Neistin-Kolubara 32-43 (14-22)**
*Sunnukvøldið 15. november kl. 18*
**10 min:** 4-7
**20 min:** 9-14
**40 min:** 20-29
**50 min:** 24-37
**Málskjúttar**
**Neistin:** Finnur Hansson 10, Jugoslav Djumic 7, David Edvardsen 7, Heini Hanusarson 5, Áki Mørk 2, Heini Ragnarsson 1

## Nøgdur og harmur

– Hatta var spell, tí vit vóru við teimum alla tíðina. Og fáar minuttir undan leikloki komu vit upp á 33-33. Teir avgjørdu dystin ein hálvan minutt fyri tíð, tá eitt ikki serliga gott hoppiskot fór inn. Skoraðu teir ikki tá, so høvdu vit havt møguleikan fyri sensatiónini, so hatta var spell, segði Heini Hanusarson, tá Sosialurin eftir fyrra dystin fekk orðið á hann.

Hóast harmur, so var Heini tó rættiliga væl nøgdur um avrikið hjá sær og liðfeløgunum í Neistanum:

– Hatta var eitt gott úrslit, tí teir hava ikki tapt í serbisku kappingini hetta kappingarárið, og talan var um eitt lið í sterkastu uppstilling. Sjálvandi kann tað vera, at teir hava undirmett okkum, og at teir mentalt ikki hava verið til reiðar. Men tað var ongantíð so, at teir settu nakra B-ketu inn, og ein garvaður spælari sum Jovanovic hjá teimum spældi allar 60 minutt-irnar.

Heini Hanusarson helt, at teir í Neistanum dugdu væl at halda fast við sítt spæl allan dystin:

– Vit høvdu góða disiplin í spælinum. Vit duttu niður einar tvær ferðir, og tað kostaði trý-fýra mál hvørja ferð, og so máttu vit aftur stríðast. Men tað gjørdu vit eisini sera væl, so tað var spell, at tað ikki eydnaðist at vinna nakað altjóða stig, segði Heini.

-mørk

## Serbar bilsnir

– Vit høvdu fyrireikað okkum væl, og hartil hava vit fólk á liðnum, ið duga serbiskt, so vit vistu frá fjølmiðlunum, at RK Kolubara undirmetti okkum. Tí fóru vit í fyrra dystinum á vøllin eftir okkara møguleika, og við ágangandi álopsspæli og dyggari verju var tað um reppið, at vit vunnu, sigur venjarin hjá Neistanum, Ingi Olsen.

– Til seinna dystin høvdu teir fingið pjøssað onkran góðan spælarar saman, teir annars høvdu ætlað at spart, so tá vóru teir uppaftur betur mannaðir. Hetta eru professionellir spæl-arar, so teir gjørdu tað, sum teir skuldu gera.

At Neistin skuldi geva so dygga mótstøðu í fyrra dystinum, var nakað, ið serbar vóru sera bilsnir av, tí tað høvdu teir slett ikki væntað:

– Teir viðgingu eftir dystin, at teir slett ikki høvdu roknað við, at vit vóru so góðir, sum vit vóru. Og teir vóru sera bilsnir av, at smáu Føroyar kundu hava so nógvar góðar hondbóltsspælarar, sigur Ingi Olsen, ið saman við hinum í Neistanum nú er á heimleið – men við einari seinking, ið møguliga forðar fyri, at liðið klárar at koma heim í kvøld.

hil